www.j.fo www.jaf.fo

# 2022: Vel enn fleiri úrslit



Henrik Old, Djóni Nolsøe Joensen, Sjúrður Skaale, Aksel V. Johannesen, Ingilín D. Strøm, Jóhannis Joensen, Bjørg Dam
Kristianna W. Poulsen, Sigrið S. Hentze, Bjarni Hammer, Eyðgunn Samuelsen, Jóan Pauli D. Jakobsen, Barbara G. Apol

JAVNAÐARFLOKKURIN



# **Úrslit** krevja **samstarv**

**Javnaðarflokkurin hevur nú í trý valskeið umboðað Føroyar á markantan og virðiligan hátt á fólkatingi, samstarvað við allar viðkomandi partar – og fingið góð úrslit fyri Føroyar. Hetta er í samsvari við floksins hugsan um, hvussu fólkatingssessurin skal nýtast:**

- Starvið skal røkjast fulla tíð.
- Samstarvast skal við øll, sum vit kunnu fáa úrslit saman við.
- Vit virða føroyska fólkaræðið, arbeiða ikki ímóti eini føroyskari stjórn, og heingja ikki føroyskar ósemjur út á snór í Danmark.
- Umboðanin skal vera týðulig og hvøss, men altíð virðilig og semjusøkjandi.
- Mótsett øðrum flokkum er Javnaðarflokkurin púra greiður, tá tað snýr seg um okkara støðu í heiminum: Vit hoyra til Vesturheimin og vit stuðla NATO. Men kravið hjá fólkatingsumboðnum er, at avgerðir innan uttanríkis- og verjupolitikk skulu takast í Føroyum.
- Vit vilja samstarva við eitt komandi føroyskt landsstýri um yvirtøkur, sum flokkurin tekur undir við.
- Vit gera upplýsandi tilfar um viðkomandi føroysk viðurskifti og upplýsa um Føroyar í Danmark.
- Vit samstarva við føroyskar myndugleikar, stovnar, vinnu- og mentanarlív, har fólkatingssessurin kann gera ein mun. M.a. vilja vit hjálpa til at finna privata og almenna fígging til verkætlanir.
- Vit fara at føra fram føroysk sjónarmið í arktiskum høpi.
- Kemur uppskotið um føroyska stjórnarskipan aftur á skrá í Føroyum, fara vit at skapa vælvild fyri tí í Danmark. Sama um ein føroysk stjórn ynskir fullan limaskap í Norðurlandaráðnum.
- Ein greining hjá okkum vísti, at tá føroyingar keypa frá Netflix, Playstation, Spotify og øðrum, fer MVG'ið í danska statskassan. Hetta vilja vit fáa broytt soleiðis, at gjaldið fer í landskassan.
- Vit fara at vera tøk hjá teimum føroyingum, sum koma tvørt fyri í skipanini, og geva ta vegleiðing, vit kunnu.

**Vit eru á fólkatingi fyri at skapa ítøkilig úrslit. Tað er tað, vit hava gjørt, og tað, vit fara at gera, vinna vit sessin aftur.**

# Fíggjarlógaravtalur hetta valskeiðið





Fólk eru ymisk á máli um, hvørt tað er rætt at fara inn í samráðingar um donsku fíggjarlógina. Men sera mong spyrja um vit kunnu hjálpa við at finna fígging, og vit hava valt at royna. Hvør einasta avtala er gjørd eftir ynski frá føroyskum felagsskapum og í samstarvi við allar viðkomandi partar. Einki snýr seg um rakstur, og tí er einki, sum knýtir Føroyar fíggjarliga tættari at Danmark.

Í alt er talan um avtalur fyri 82 mió. krónur. Vit hava gjørt avtalur fyri 25,2 mió. beinleiðis millum Javnaðarflokkin og stjórnina, meðan avtalur fyri 56,8 mió. eru gjørdar saman við einum ella fleiri av hinum norðuratlantisku limunum á fólkatingi.

Sigast skal, at sera mongum, sum hava heitt á okkum um at finna fígging til verkætlanir, hava vit ikki kunnað hjálpt. Men vit hava kortini, umframt tær avtalur, sum her verða nevndar, slóðað fyri samstarvi millum fleiri føroysk áhugafeløg og privatar útlendskar grunnar. Harumframt hava vit sett føroyskar fyritøkur í samband við stóran, útlendskan lánveitara.

## 2020

2 mió. kr. til at tryggja føroyska skúlaverkinum talgilda atgongd til eina rúgvu av bókmentum og sjónvarpstilfari til undirvísing. Avtala gjørt í samráð við Mentamálaráðið.

5 mió. kr. til undirvísing í føroyskum viðurskiftum á Keypmannahavnar Universiteti. Avtala gjørd í samráð við Fróðskaparsetrið og Keypmannahavnar Universitet.

## 2021




1,2 mió. kr. til menning av føroyskum talukennara. Avtala gjørd í samráð við Sjóndepilin.



11 mió. kr. til at seta søguliga bygningin Pakkhús 18 á Tvøroyri stand. Avtala gjørd í samráð við Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn.

6 mió. kr. (+ 2 mió. kr. í 2022) til nýtt Sjósavn og Mentanarhús í Sørvági - seinnu 2 mió. saman við Sambandsflokkinum. Avtala gjørd í samráð við arbeiðsbólkin, Jóhannis Joensen, løgtingsmann og Sørvágs kommunu. (Húsið skuldi byggjast í Miðvági, men loyvini komu ikki upp á pláss. Avgerðin um at byggja í Sørvági er ikki endalig, og nakað av fígging skal finnast afturat. Men allir partar eru positivt sinnaðir, og væntandi kemur alt upp á pláss í vetur).

FILMSHÚSIÐ FAROESE FILM INSTITUTE

26,8 mió. kr. til framleiðslu av dokumentarfilmum í Føroyum, Grønlandi og Danmark. Avtala gjørd saman við hinum norðuratlantisku tinglimunum og í samráð við Filmshúsið. Vit gjørdu eina líknandi avtalu síðsta valskeið, hon var m.a. við til at fíggja vælumtókta filmin Skál.



## 2022

30 mió. kr. til stórhøll í Føroyum. Avtala gjørd saman við Sambandsflokkinum í samráð við arbeiðsbólkin, sum stendur fyri hesum og við Tórshavnar Býráð. Avtalan slóðaði fyri, at fleiri íleggjarar komu afturat, so høllin nú kann byggjast.

# **Nógv** og **fjølbroytt** mál

Vanligasti mátin at reisa mál á fólkatingi er gjøgnum skrivligar spurningar til stjórnina. Hetta yvirlitið vísir, hvussu nógv mál vit á hendan hátt hava reist farnu trý árini, og hvat tey hava snúð seg um. Í hvørjum máli sær hava vit sett fleiri spurningar, so tað talið er fleiri 100.

Ráðharraspurningar JAF 2019-2022






## **Føroyskir fangar** fáa betri kor

Ábøtur eru gjørdar í arrestini í Mjørkadali, ein fótleinkjuskipan kemur í Føroyum, og eitt nýtt fongsul fer at verða bygt. Hetta er alt nakað, vit hava virkað fyri í áravís. Vit hava eisini hava átalað nýtsluna av isolation í Føroyum, og at føroyingar verða sendir til Danmarkar at sita. Hetta verður alt betri við einum veruligum fongsli. Tað hevur ikki minst verið Barbara Gaardlykke Apol, sum hevur havt fokus á hesi viðurskifti, tá hon hevur verið inni sum varafólk.
Haraftrat legði Djóni Nolsøe Joensen fram uppskot fyri løgtingið í 2020, har hann heitti á landsstýrið at taka neyðug stig til, at umstøðurnar í Arrestini verða nøktandi og á sama stigi sum í danska fongsulsverkinum annars. Uppskotið bleiv einmælt samtykt.



## **Túsundtals føroyingar** sleppa undan dupultum skatti

Í áravís hava túsundtals føroyingar togast við danskar myndugleikar fyri at fáa alla sína pensjón. Fólk hava av órøttum goldið skatt í Danmark, og ikki fingið sínar pengar aftur uttan drúgt stríð. Hjá mongum hevur tað verið ein marra. Vit hava tikið málið upp í samráð við m.a. Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, og framyvir verða skattafrítøkur automatiskt skrásettar í donsku skipanini.

## **Rættindi** hjá ákærdum

Ofta mugu føroyingar bíða í áravís áðrenn teir fáa dóm í donsku rættarskipanini. Og stundum verða teir fríkendir eftir ikki at hava kunna virkað til fulnar í meira enn 10 ár. Bíðitíðin er sum ein dómur – og stundum ein skeivur dómur. Hetta hava vit tikið upp, og endin var ein fólkatingssamtykt um, at bíðitíðin skal styttast.





## **Føroyskar kirkjur** klekja ongan terrorist

Til tess at steðga islamistiskari radikalisering í donskum moskum, ætlaði stjórnin, at allar prædikur á fremmandum máli í Danmark skuldu umsetast til danskt. Eisini føroyskar prædikur. Hetta kundu vit als ikki góðtaka. Eftir góðan dialog við stjórnina og eina frálíka vitjan í Eliaskirkjuni, har umboð fyri Kristnastovu eisini vóru við, bleiv ætlanin slept.

## **Filmar í Føroyum/á føroyskum** kunnu fáa stuðul



Tá søkt verður um danskan stuðul til filmar, sum heilt ella lutvíst fara fram í Føroyum ella á føroyskum, verða umsóknirnar avvístar, tí "Føroyar" verða roknaðar sum útland og "føroyskt" sum fremmandamál. Vit hava gjørt avtalu við flestu flokkar um at broyta hetta, tá nýggj filmsavtala verður gjørd seinni í ár, og latið mentamálaráðharranum avtaluna. Kanska hetta má gerast umaftur eftir valið, men væntandi standa flokkarnir við tað, teir hava sagt. Tað fer at geva føroyskari filmsvinnu størri møguleikar.




## **Microsoft translate** á føroyskum

Vit hava í samstarvi við m.a. Sprotan fingið í lag samstarv við Microsoft, so føroyskt nú er partur av Microsoft Translate. Enn virkar skipanin ikki nóg væl, men tað gongur skjótt framá. Næsta mál er at fáa føroyskt við hjá øðrum tøknirisum.



## **Persónsmál**

Vit hava fingið sera nógvar fyrispurningar um hjálp frá fólki, sum eru komin tvørt fyri í skipanini. Vit hava vegleitt so væl vit kunnu – ofta í samráð við Ráðgevingina fyri føroyingar í Danmark. Tá fyrispurningarnir hava verið av prinsipiellum slag, hava vit eisini tikið teir upp sum politisk mál á fólkatingi. Tað skal sigast her: Øll hava ikki fingið ta hjálpina, tey ynsktu! Men vit hava gjørt okkara besta.

## **Lættari hjá listafólki** at sýna fram í Danmark

Ein sokallað "trygdarveðseting" fyri fyribils innflutningi av list til framsýningar hevur gjørt tað sera tvørligt hjá føroyskum listafólki at sýna fram í Danmark. Vit hava eftir áheitan frá listafólki virkað fyri at fáa kravið tikið burtur, og tað eydnaðist í juli 2022, tá vit fingu lógina broytta. Nú er væl smidligari at sýna fram í Danmark.



# Upplýsing

**Upplýsing er ein týdningarmikil partur av arbeiðinum hjá Javnaðarflokkinum á fólkatingi. Her er eitt sindur um tiltøk, vit hava skipað fyri, og kanningar, vit hava gjørt.**

## Tiltøk



**Hetta er land mítt – hvørsmansrættur í Føroyum.** Ferðavinna, bóndur og gongufólk hava hvør síni áhugamál, tá tað snýr seg um rættin at ganga í haganum. Fyri fullum sali í Norðurlandahúsinum lýstu vit evnið úr ymiskum sjónarhornum. Myndin sýnir tey, ið løgdu fram.



**Mentanarnátt.** Hvørt ár hevur verið mentanarnátt á Christiansborg við føroyskum mati, tónleiki, filmum, sniðgeving og øðrum.



**Føroyar millum stórveldini.** Hvørjar avbjóðingar og møguleikar hava Føroyar av áhuganum frá stórveldunum? Hetta settu vit á dagsskrá á stórari ráðstevnu á Hotel Føroyum, har politikarar, myndugleikar og granskarar løgdu fram. (Á myndini hevur løgmaður orðið).



**Sig mær hvør hvørjum tú fylgist við.** Spenta støðan í heiminum við kríggi í Europa hevur gjørt, at vit greitt mugu velja síðu – og tað kann kosta. Á ráðstevnu har serfrøðingar og politikarar løgdu fram, lýstu vit tvístøðurnar, sum kunnu koma, tá valið stendur millum inntøkur her og nú og okkara moralsku virði.



**Umboðan.** Javnaðarflokkurin hevur umboðað Føroyar greitt og væl á Fólkatingi, og tað hevur givið nógva umrøðu, bæði í donskum miðlum og aðrastaðni. T.d. varð Sjúrður Skaale í 2020 kosin at halda "alternativa nýggjársrøðu" í DR.





**Fosturtøka í Føroyum.** Fyri fullsettum Reinsaríi í Havn løgdu vit fram frágreiðing sum sýnir, at rein tilvild og lógloysi ræður á fosturtøkuøkinum í Føroyum. Aftaná var politiskt kjak. Ósemja var um loysnina, men full semja var um, at verandi skipan ikki er í lagi.

# Frágreiðingar

**Vit hava gjørt fleiri djúptøkar greiningar av ymiskum samfelagsmálum, og fingið nýggja vitan fram.**




**Mvg.dk.** Føroyingar rinda fleiri milliónir í MVG fyri nettænastur, sum eiga at koma í landskassan, men fara beint av landinum.




**Javnstøðugreining – kommunuval 2020.** Greiður samanhangur er millum hvussu nógv av hvørjum kyni eru uppstillað til kommunuvalini, og hvussu kynsbýtið í bý- og bygdaráðunum síðani verður. Tess fleiri kvinnur eru á atkvøðuseðlunum, tess fleiri verða valdar.




**Ymiskar fortreytir – ein lýsing av vantandi javnstøðuni í Føroyum.** Í Føroyum hanga inntøkumøguleikar og sannlíkindini fyri at koma í valdsmiklar sessir neyvt saman við kyni. Menn eiga jørðina, virkini, skipini og fiskiloyvini, og menn sita í teimum leiðandi sessunum. Stutt sagt: Menn eiga Føroyar – og ráða í Føroyum.




**Vinningsbýti – ein blokkstuðul til útlendskar eigarar um árið.** Ognarviðurskiftini innan størstu fyritøkurnar í Føroyum verða lýst, eins og víst verður, hvussu nógv varð goldið í vinningsbýti frá 2016-2018. Hugt verður at, hvussu nógv endar í landskassanum, hvussu nógv endar uttanlands, og hvørjar vinnugreinar kasta mest av sær. Víst verður á, at tað als ikki er fullfíggjað innlit í hesi viðurskifti. Serliga innan fiskivinnuna eru ognarviðurskiftini sera fløkjaslig.




**Verja & vandi.** Vaksandi áhugin frá stórveldunum hevur gjørt, at vit mugu velja síðu. Tað, vit gera, hevur týdning fyri onnur enn okkum sjálv. Heilt ítøkiliga hava vit skulað gjørt av, um vit skuldu halda fram at samstarva við kinesiska Huawei og um vit skuldu loyva einum NATO-radara í Føroyum. Í hesi stóru frágreiðingini verða okkara verju- og trygdarpolitisku viðurskifti lýst í søguligum høpi, eins og hugt verður at politiska rásarúminum hjá Føroyum í altjóða samanhangi.




**Fosturtøka í Føroyum – tilvild og lógloysi.** Henda nógv umrødda frágreiðing vísti millum annað, at talið á teimum kvinnum, sum eru føddar í Føroyum men fáa fosturtøku í Danmark, er dupult so stórt sum talið á teimum, sum fáa fosturtøku í Føroyum.

Allar frágreiðingar kunnu lesast á www.jaf.fo

   

# **Virðilig** umboðan gevur **úrslit**



Sum floksformaður havi eg dagligt samskifti við fólkatingsumboð okkara. Vit eru ikki, sum stundum verður sagt, ein flokkur á løgtingi og ein annar á fólkatingi. Vit eru ein flokkur, sum er umboðaður í kommununum á bygd og í bý, á løgtingi – og á fólkatingi. Allar tær týðandi avgerðirnar, sum verða tiknar á fólkatingi, og allar verkætlanir verða góðkendar av floksleiðsluni.

Men hugsanin við umboðan okkara á Christiansborg er, at tann, sum hevur sessin, ikki bara skal arbeiða fyri flokkin, men fyri allar føroyingar. Og demokratiski viljin hjá Føroya fólki verður umboðaður av landsstýrinum. Tí fara vit ikki á fólkatingi at arbeiða ímóti landsstýrinum ella at leggja innlendis føroyskar ósemjur á blik. Hvat vit siga í orðaskiftinum í Føroyum er sjálvandi ein onnur søk.

Tá vit hava eina fólkatingsumboðan, sum virðing stendur um, og sum talar Føroya søk í breiðastu merking, er lættari at fáa ta vælvild og tað samstarv við donsku stjórnina, sum tørvur ofta er á.

Og tað hevur eydnast væl – uttan mun til, um danska stjórnin hevur verið blá ella reyð. Samstarvið við stjórnina hjá Lars Løkke Rasmussen var gott, og tað hevur samstarvið við stjórnina hjá Mette Frederiksen hevur eisini verið. Tað er sjón fyri søgn, tá hugt verður at tí, sum er komið burturúr.

Sjálvandi styrkir tað eisini Javnaðarflokkin at hava umboðan á fólkatingi. Tað gevur okkum ein stóran pall, betri atgongd til viðkomandi fólk, og sum heild betri møguleikar at virka fyri tí, vit halda vera rætt.

Uttan mun til, hvør vinnur valið í Danmark, fara vit at samstarva við tey. Júst sum vit hava gjørt higartil. Til gagns fyri allar føroyingar.

Sum formaður eri eg stoltur av tí, sum er komið burturúr á fólkatingi – bæði farnu trý árini, og tey undanfarnu valskeiðini.

Ert tú samd/ur í, at úrslitini eru á góðari leið? Heldur tú, at umboðanin hevur verið sjónlig, góð og virðilig?

So er valið upplagt. Tí vit fara at halda somu kós, vinna vit sessin aftur.

*Vinarliga,*
**Aksel V. Johannesen, floksformaður**